# Trivnaðarætlan

<table>
<tr><td>Flokkur:<br>1.a</td><td>Næmingatal:<br>21</td></tr>
<tr><td colspan="2">Flokslærari:<br>SL</td></tr>
<tr><td>Toymi:<br>SL<br>AD</td><td>Hinir lærararnir í flokkinum:<br>SV<br>HK</td></tr>
<tr><td colspan="2">Røklaskipanin:<br>Næmingarnir skiftast um at vera røklar.<br>Vaska talvu, rudda og fara eftir mjólk.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Borðskipan:<br>Tvey og tvey sita saman. Vit skifta pláss av og á.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Føðingardagar<br>"Floksins tíma"<br>Renningardagur<br>Tiltak frá Listaleypinum<br>Jólavirksemi<br>Føstulávintshald<br>Grækarismessa - Flaggdagur<br>Verkætlan<br>Útferð</td></tr>
<tr><td colspan="2">Serliga viðmerkingar um flokkin:</td></tr>
</table>

# Trivnaðarætlan

| | |
|---|---|
| Flokkur:<br>2.A | Næmingatal:<br>19 |
| Flokslærari:<br>Miriam G. Rasmussen | |
| Toymi:<br>Miriam G. Rasmussen<br>(Ro, Kri, Evn, Ítr. ge)<br><br>Guðrun M. Hansen<br>(Fø og Heim) | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Osla Gøthe (Tón)<br>Óli Jákup Joensen (Ítr. dr) |
| Røklaskipanin:<br>Á uppslagstalvuni á stovuni hongur ein seðil, um hvør er røkil - altíð ein genta og ein drongur. Hesin seðil sigur eisini, hvør stendur fremst til morgunsang og aðrar tíðir, tá vit stilla upp til rekkju.<br>Røklarnir syrgja fyri at stovan er ruddulig tá farið verður til hús. Hvørt fríkorter skulu vindeyguni vera opin. Røklarnir fara eftir mjólk í mattímanum. Teir hjálpa eisini læraranum við smáum uppgávum. | |
| Borðskipan:<br>Vit skifta javnan pláss í klassanum, men hava ikki nakra fasta skipan. Lærararnir vurdera út frá støðuni í flokkinum, hvussu best er at sita. Men vit leggja dent á, at næmingarnir skiftast at sita hjá hvørjum øðrum og at borðini standa á ymiskan hátt | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>- 2.a eigur eina bamsu, sum hvørt vikuskifti fer heim við einum næmingi. So skrivar onkur í húsinum í eina dagbók, hvat bamsan hevur upplivað í vikuskiftinum.<br>Mánamorgun - 1.tíma - lesur lærarin úr dagbókini fyri øllum børnunum.<br>Í hesum tímanum verður eisini undirvíst í "Stig fyri stig"<br>Hvønn mánadag hevur ein í flokkinum kaku ella frukt við til allan flokkin. Tað eta vit aftaná matpakkan.<br>- Í vár settu vit eplir niður og tey skulu takast upp vikuna áðrenn heystfrítíðina.<br>- Seinastu viku í nov er mentanarvika í Runavík. Vit ganga ein túr ígjøgnum býin.<br>- Í des endurtaka vit succé-ina frá í fjør - jólacafé í skúlastovuni - vit baka smákøkur, sum vit selja til foreldur, ommur og abbar.<br>- Frits Johanessen, sum eigur abbadóttir í flokkinum, kemur ein dag at hava okkurt listarligt átak við flokkinum.<br>- Ævintýrferðin kemur at vitja á skúlanum í nov<br>- Tiltøkini frá listarleypinum hóskandi til innskúlingina eru bíløgd<br>- Til várs fara vit ein túr til Havnar, har vit vitja sjósavni, viðalundina og Føroya Tele<br>- Mai/juni sova vit eina nátt á skúlanum<br>- Annars lofta vit teimum møguleikum sum koma framvið at gera okkurt sum brýtur frá dagligdegnum.<br>- 2.a hevur eitt sera virki foreldraráð, sum hvørt ár skipar fyri 2 tiltøkum, har børn, foreldur og lærarar hugna sær saman | |

Serliga viðmerkingar um flokkin:
Í 2.a ganga 19 næm. 11 gentur og 8 dreingir. Hetta er ein góður flokkur og børnini trívast væl. Ein nýggj genta er komin í flokkin í ár, og hon sær út til at vera fallin væl til.
Næmingarnir hava sera gott arbeiðslag. Eru røsk at arbeiða, bæði sum einstaklingar og eisini í bólkum. Vit leggja dent á, at hvør næmingur til fulnar fær brúkt sínar gávur á ein ella annan hátt.
Foreldrini at børnunum eru sera jalig, og tað smittar av uppá bæði børn og lærarar.

# Trivnaðarætlan

<table>
<tr><td>Flokkur:<br>2.B 2009/2010</td><td>Næmingatal:<br>14</td></tr>
<tr><td colspan="2">Flokslærari:<br>May í Túni Højgaard</td></tr>
<tr><td>Toymi:<br>May í Túni Højgaard<br>Birna Vestergaard</td><td>Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Brynhild W. Djurhuus, sum er stuðul í føroyskum og í rokning.<br>Miriam Rasmussen og Óli Jákup Joensen hava børnini í ítrótti.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Røklaskipanin:<br>Flokkurin hevur eina fasta røklaskipan. Tvey børn eru røklar á gangin, og tey eru røklar í eina viku á gangin. Røklarnir fara eftir mjólk, hjálpa læraranum at deila pappír úr og koyra vindeyguni upp.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Borðskipan:<br>Vit skifta pláss javnan. Uml. eina ferð um mánaðin. Endamál við at skifta ofta er; at børnini koma at kenna hvønn annan betur og tí eisini læra at arbeiða/samskifta væl saman. Aðra tíðir skifta vit eisini, eftir hvør hóskar saman.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Ætlanin er at hava tvey hugnakvøld við børnum og foreldrum. Vit valgdu trý foreldraumboð síðsta skúlaár til at taka sær av tiltøkunum í samstarvi við lærararnar.<br>Vit høvdu eisini vinarbólkar síðsta ár, sum eg haldi, er ein góður møguleiki hjá børnunum at koma at kennast betur. Men tað er ikki vist, at teir vera í ár, tá onkur til síðsta foreldrafund, ikki hildu tað vera so neyðugt.<br>Vit fara onkra útferð í leypi av árinum. Vónandi tvær ymiskar, eina í nærumhvørvinum, og eina hvar vit fara eitt sindur longri. Ferðirnar eru serliga fakligar, men eisini við einum sosialum endamáli.<br>Annars í sjálvum tímunum, sita vit til tíðir í runding og tosa um ymisk ting, sum børnini hava á hjarta. Vit spæla onkuntíð spøl.<br>Eg fari aftur í ár at hava samtalur við børnini.<br>Eg fari at taka evnir upp úr tilfarinum Trin for Trin.<br>Øll hesi ting eru hugsað í samband við trivnaðin hjá børnunum.</td></tr>
</table>

Serliga viðmerkingar um flokkin:
Í flokkinum eru fýra gentur og tíggju dreingir. Tað merkist, at tað eru flest dreingir.

# Trivnaðarætlan

| | |
|---|---|
| Flokkur:<br>3.a | Næmingatal:<br>23 |
| Flokslærari:<br>Jónsvein Simonsen | |
| Toymi:<br>Miriam Rasmussen<br>Jónsvein Simonsen | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Guðrun Malena Hansen<br>May í Túni<br>Hugo Leo<br>Sámal Petur Petersen |
| Røklaskipanin:<br>Næmingarnir skiftast um at vera røklar.<br>Lata vindeyguni upp, rudda og fara eftir mjólk. | |
| Borðskipan:<br>Vit skiftast um at sita hjá hvørjum øðrum, eisini gentur og dreingir, hetta hevur lukkast nú, eftir at serliga onkur genta ikki dámdi at sita hjá einum dreingi. | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>September: felags foreldrafundur<br>Oktober: Foreldraviðtala.<br>November: Foreldra/næmingakvøld.<br>Desember: Pynta stovuna til jóla, jólahald<br>Februar : Verkætlan<br>Juni: Útferð<br>Hugnatími er hvønn mánaða | |
| Serliga viðmerkingar um flokkin:<br><br>3. a er ein raskur flokkur, sum eg haldi dugir bara væl, sjálvt um spjaðingin er stór . So at siga øll duga nú at skriva samanbundna skákskrift, sum má sigast at vera tíðliga, og kemst hetta av at byrjað var so at siga beinan vegin at binda bókstavir saman.<br>Næmingar eru, sum hava hug at dominera í so nógv, og mugu tí ofta vera ámintir um eisini at lata hini sleppa framat. Fingurin upp, tá tú ynskir at fortelja okkurt og so lurta hini. Ein kunstur er nokk eisini at fáa tey stillu børnini at opna seg. | |

# Trivnaðarætlan

<table>
<tr><td>Flokkur:<br>3. B</td><td>Næmingatal:<br>21.     8 gentur og 12 dreingir</td></tr>
<tr><td colspan="2">Flokslærari:<br>Margretha Bjarnastein</td></tr>
<tr><td>Toymi:<br>Margretha Bjarnastein<br>Katrin Højsted</td><td>Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Hans Jákp Lamhauge<br>Jónsvein Simonsen<br>Pálin Olsen<br>Katrina Maria Vang (SV)</td></tr>
<tr><td colspan="2">Røklaskipanin:<br>Næmingarnir skiftast um , tveir og tveir at vera røklar eina viku,<br>fara eftir mjólk og rudda</td></tr>
<tr><td colspan="2">Borðskipan:<br>Vit sita á egnum plássi og eta</td></tr>
<tr><td colspan="2">Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Floksins tími er 2 ferðir um mánaðin - vit práta/spæla. Er eitthvørt átrokandi mál viðvíkjandi trivnaðinum í flokkinum, taka vit tað upp til viðgerðar .<br>Vit kvøða og dansa vetrarhálvina til føstulávint.<br>Føstulávintshald<br>Vinarbólkar<br>Sjónleikaravitjan í november<br>Jólahald<br>Floksveitslu (sum foreldraráðið skipar fyri ?)<br>Túrur til ???? áðrenn summarfrítíðina.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Serliga viðmerkingar um flokkin:<br>Ein fittur, dugnaligur og sum oftast arbeiðssamur flokkur. Spennandi í so máta, at har eru fleiri leiðarar, sum allir vilja "bestemma". Næstan dagliga eru áminningar um, at øll skulu vera her, og at øll skulu hava tað gott, og at vit sum flokkur eiga at vera góð við hvønn annan.</td></tr>
</table>